# Hættisligt tá bilførarar SMS´a

**Allir bilførarar vita at tað ikki er loyvt at halda fartelefonini og tosa undir koyring. Í summar bleiv ein fýra ára gomul donsk smágenta yvirkoyrd í Norra. Bilførarin er skuldsettur fyri at hava SMS´að, tá gentan bleiv yvirkoyrd**



Tað er hættisligt hjá bilførarum at senda og móttaka SMS-boð undir koyring



Sjåfør sendte SMS - siktet for bildrap på Martine (4)

TRONDHEIM (VG) 30-åringen sendte tekstmeldinger mens han satt bak rattet. Nå er mannen siktet for bildrap på Martine Skagen (4).

Politiet mener bruken av mobiltelefon under kjøring førte til at sjåføren ikke greide å stanse da barnet løp ut i veien.

Bruk av håndholdt mobiltelefon i bil er forbudt. Martines død kan bli den første tragedien der en domstol må vurdere SMS-aktivitet i tilknytning til et påstått uaktsomt drap i trafikken.

Påtalespørsmålet

Hendan fitta smágentan, fýra ára gamla Martine frá Skagen, bleiv yvirkoyrd og doyði av eini ferðsluvanlukku í Norra í summar. Bilførarin er nú skuldsettur fyri óviljað dráp og fyri at hava SMS´að, tá ferðsluvanlukkan hendi

FARTELEFONIR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er ikki uttan orsøk, at tað ikki er loyvt bilførarum at halda fartelefonini í hondini og tosa undir koyring. At senda og móttaka SMS-boð undir koyring kann eisini føra til álvarsligar ferðsluvanlukkur.

25. juli ár bleiv fýra ára gamla Martine frá Skagen yvirkoyrd og doyði í Herøy í Norðurnorra. Hon stóð saman við eini trý ára gamlari vinkonu klár at fara yvir um ein koyriveg. Tann trý ára gamla fór fyrst og Martine aftaná, men hon bleiv yvirkoyrd av einum bili og doyði tveir dagar seinni á sjúkrahúsi í Tróndheimi. Á hesum vegastrekki var gott útsýni og ikki loyvt at koyra yvir 60 km/t. Bilførarin koyrdi heldur ikki ov skjótt. Politiið hevði ilt við at skilja orsøkina til hesa ferðsluvanlukkuna, til teir kannaðu fartelefonina hjá bilføraranum og funnu útav, at hann hevði sitið og sent SMS-boð, tá gentan bleiv yvirkoyrd.

30 ára gamli bilførarin er nú skuldsettur fyri óviljað dráp og fyri at hava brotið lógina um brúk av fartelefon undir koyring.

Stjórin á Trygg Trafikk í Norra, Leiv A. Ellevset, sigur, at hann er bangin fyri, at tað at bilførarar sita og SMS´a undir koyring verður ein av orsøkunum til nógvar ferðsluvanlukkur í framtíðini.

*Kelda: VG innenriks*

# Vænta príshækking á posarækjum

**- Eitt, sum er positivt í rækjuvinnuni í løtuni, er, at vit vænta eina príshækking á smárækjum við 2-3 kr. fyri kilo, sigur Petur Jacobsen, reiðari**



*Í summar hava føroysku rækjuskipini havt góðan fiskiskap á Flemmish Kap. Rækjurnar eru smáar, men skipini hava gjørt nakrar stuttar túrar, sum hava givið nakað av peningi*

RÆKJUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ilt at síggja glottar hjá teimum, sum starvast í rækjuvinnuni, men eitt, sum nú er farið at vísa seg, er ein hækking í prísinum á posarækjum.

Petur Jacobsen, reiðari, sigur, at ein orsøk til betri prísútlit, er, at eitt nú kanadiumenn hava sæð, at tað nyttar lítið bara at senda rækjur í stórum nøgdum út á marknaðin.

- Hetta gevur ov lítið, og úrslitið verður, at eingin fær nakað burtur úr.

## Størri kvotur, lægri prísur

Hann vísir á, at bæði kanadiska stjórnin og grønlendska heimastýrið hava økt rækjukvoturnar mundandi, og hetta hevur verið ein týðandi orsøk til, at rækjumarknaðurin hevur verið so vánaligur. So hvørt, kvoturnar eru øktar, er rækjuprísurin fallin.

- Vánaligi rækjumarknaðurin hevur ført til, at kanadiskir rækjutrolarar í størri og størri mun eru farnir at fiska onnur fiskasløg, eitt nú svartkalva, tí hetta loysir seg betur. Teir hava eftirhondini funnið út av, at lítil meining er í at føra stórar nøgdir av rækjum til lands, sum lítið fæst fyri.

Petur veit at siga, at teir nýggju norsku rækjutrolararnir eisini hava ligið tungt í sjónum, men nakrir teirra hava so møguleika eisini at veiða tosk ein part av árinum.

- Teir, sum bara hava rækjurnar at dúva uppá, eru tungir í rakstri, sigur hann.

## Stuttar túrar

Reiðarin vísir á, at føroysku rækjuskipini í seinastuni hava tjent nakað av peningi við at gera stuttar túrar á Flemmish Kap.

- Fiskiskapurin á Flemmish Kap hevur verið góður, men rækjurnar eru smærri enn vanligt. Skipini hava gjørt nakrar skjótar túrar, har tey í hálvan annan til tveir mánaðir hava fingið millum 400 og 500 tons av rækjum. Hetta gevur ikki tað heilt stóra í peningi, men er skjótt vunnin peningur, sum er komin væl við hjá skipunum.

Petur Jacobsen sigur, at eini 60-70% av veiðini hesar túrarnar hava verið smáar posarækjur, sum lagdar eru upp á Oyri.

- Hini 30% verða so seld á øðrum marknaðum fyri ein prís, sum liggur á einum rímiligum støði, sigur reiðarin.

# ítróttur

Nr. 180 • mikudagur • 24. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heini dagsins maður í sensatión



*Heini Hanusarson varð kosin sum besti leikarin, tá hann og liðfelagarnir gjørdu av við risafavorittarnar úr Skjern*

**Í fyrsta heimadystinum eydnaðist Team Midtsjælland at basa DM-favorittunum úr Skjern. Dysturin varð sendur beinleiðis í sjónvarpinum, og Heini Joensen varð kosin dagsins maður**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki eiti at heimavallar-debut, sum Heini Hanusarson fekk, tá hann við nýggja felagi sínum, Team Midtsjælland, tók ímóti Skjern í bestu donsku hondbóltsdeildini.

Skjern misti DM-gullið á stokkinum í fjør, og frá flestu síðum verða teir roknaðir sum ein av avgjørdu DM-biðlunum undan hesum kappingarárinum.

Team Midtsjælland er hinvegin júst flutt upp í deildina, og tí var eisini avmarkað, hvussu stórar vónirnar til liðið vóru undan árinum.

Men tað løgdu Heini og teir líka í. Eftir at Skjern var liðið, sum fekk betru byrjanina, so fekk heimaliðið alt betri tak á dystinum, og sum minnuttirnir gingu, so tóktist ein verulig sensatión alt nærri. Ikki minst eftir Skjern ikki megnaði at skora fyrstu átta minuttirnar av seinna hálvleiki.

Og tó at Skjern seinastu 20 minuttirnar royndi at seta ein endaspurt ígongd, so helt heimaliðið fast. Eisini tá teir seinastu løtuna spældu við fimm móti sjey, og eisini hóast Skjern í seinasta álopinum tók málverjan út fyri ein útileikara.

Eitt var, at hetta var ein sensatión av teimum stóru í donskum hondbólti, men við føroyskum eygum var stóra søgan, at Heini Hanusarson gjørdist dagsins maður í dystinum.

Fimm ferðir fann hann vegin til meskarnar, og eftir dystin vóru viðhaldsfólkini hjá liðnum somikið ovfarin, at tey valdu Heina til dagsins leikara. Ein heiður, sum føroyski landsliðsmaðurin sjálvandi fegnaðist um.

- Tað sigur seg sjálvt, at hetta var ein ótrúliga stuttlig uppliving. Skjern var jú roknað sum ein av stóru favorittunum, og á pappírinum er liðið hjá teimum átta milliónir krónur dýrari enn okkara, so tað var heilt víst eitt úrslit, sum fólk løgdu til merkis, sigur Heini.

- Og at tað so eisini skuldi ganga somikið væl hjá mær persónligt, var bara eyka stuttligt. Sum nýggjur í einum felagi kann tað jú verða trupult at verða góðtikin av viðhaldsfólkunum, og verður tú fyrst róptur ein fiasko einaferð, so kann hetta verða ótrúliga trupult at sleppa av aftur við.

Nú er støðan kanska heldur øðrvísi hjá Heina. Við góða avrikinum kann tvørturímóti hugsast, at hann longu nú er góðtikin av viðhaldsfólkunum, soleiðis at hesi heldur fara at fyrigeva honum, tá dagarnir ikki verða eins góðir. Ein støða, sum Heini sjálvur ikki ivast í fer at koma fyrr ella seinni.

- Tað er einki at ivast í, at eitt slíkt bragd kunnu vit ikki fremja í hvørjum dysti. Enn eru 24 dystir eftir at spæla, og málið hjá okkum er fyrst og fremst at halda okkum í deildini. Tað vil við øðrum orðum siga, at vit helst skulu vinna dystirnar móti teimum veikaru liðunum í deildini, so í so máta var hetta bara ein eyka bonus. Vit fara so ikki upp at sveima av hesum eina úrslitinum, sigur Heini avgjørdur.

## Góðar umstøður

Í aðrar mátar, so tykist Heini at lata heilt væl at umstøðunum í nýggja felagnum. Ikki minst venjingarumstøðurnar eru í topp, men afturfyri, so verður eisini kravt nógv av leikarunum.

- Vit venja fýra ferðir um vikuna, og í trimum av hesum førunum er tað soleiðis, at vit undan sjálvari hondbóltsvenjingini eru ein tíma í vektrúminum, har ein servenjari tekur sær av okkum.

- Soleiðis er hvørt venjingarkvøld einar tríggjar tímar langt, og tað rokni eg eisini við er neyðgut, um vit skulu standa okkum. Ikki minst við styrkisvenjingini, tí vit hava eitt sera ungt lið, og tí er einki at ivast í, at vit skulu vera í toppvenjing, um vit skulu gera nakrar skreytir.

Og higartil er so einki at ivast í, at liðið fer at gera skreytir. Fyrsta av hesum var altso DM-favoritturin, og spurningurin er so, hvørt teir eisini fara at vinna sær líknandi úrslit í komandi dystunum.

## Danska TDC-ligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GOG | 2 | 2 - 0 - 0 | 63 | 32 | 23 | 4 |
| 2 | AaB | 2 | 2 - 0 - 0 | 63 | 41 | 19 | 4 |
| 3 | Århus GF | 2 | 2 - 0 - 0 | 72 | 53 | 23 | 4 |
| 4 | KIF | 2 | 2 - 0 - 0 | 59 | 50 | 6 | 4 |
| 5 | Bjerringbro | 2 | 2 - 0 - 0 | 54 | 46 | -16 | 4 |
| 6 | Skjern | 2 | 1 - 0 - 1 | 53 | 49 | 6 | 2 |
| 7 | Silkeb.-Voel | 2 | 1 - 0 - 1 | 51 | 51 | 9 | 2 |
| 8 | TMS | 2 | 1 - 0 - 1 | 42 | 47 | 9 | 2 |
| 9 | Fredericia | 2 | 1 - 0 - 1 | 45 | 62 | 9 | 2 |
| 10 | Helsinge | 2 | 0 - 0 - 2 | 55 | 65 | 9 | 0 |
| 11 | Tvis | 2 | 0 - 0 - 2 | 50 | 60 | 9 | 0 |
| 12 | Ajax | 2 | 0 - 0 - 2 | 51 | 62 | 9 | 0 |
| 13 | FCK | 2 | 0 - 0 - 2 | 43 | 54 | 9 | 0 |
| 14 | Otterup | 2 | 0 - 0 - 2 | 44 | 73 | 9 | 0 |

Føroyskir leikarar: Heini Hanusarson (TMS)